# Ukrainsk operakonsert

**Leygardagin 30. november klokkan 16:00 verður konsert í Norðurlandahúsinum við operasangarunum Vasyl Chepelyuk og Mykhaylo Lazuka og harmonikuspælaranum Vsevolod Lazuka úr Ukraina. Konsertin er fingin í lag í sambandi við Skandinavisku Barnamissiónina**

KONSERT
*Tíðindaskriv*



*Ukrainsku operasangararnir Vasyl Chepelyuk og Mykhailo Lazuka ávegis til Føroya. Sitandi, ímillum teir, er harmonkasnillingurin Vsevolod Lazuka, sum er sonur Mykhailo. Myndin er tikin týsdagin í Operahúsinum í Malmø. Leygardagin hava teir konsert í Norðurlandahúsinum.*

Leygardagin verður fjøltáttað konsert í Norðurlandahúsinum. Byrjað verður við M.C. Restorff, sum syngur tríggjar sangir við egnum fylgispæli.

Eftir henda heimliga inngang koma høvuðsnøvnini á pallin. Teir eru operasangararnir Vasyl Chepelyuk og Mykhailo Lazuka úr Ukraina. Á skránni hava teir fólkasangir og romansur úr heimlandinum, kosakksangir og brot úr vesturlendskum verkum eftir Verdi, Puchini og Schubert, eins og sálmar sum "Amazing Grace". Og ikki at gloyma Santa Lucia, nú jólini eru í nánd.

Vasyl Chepelyuk er føddur í landslutinum Volyn í Ukraina 1954. Í sjeytiárunum læs hann tónleik í Lutsk og seinni á lærda mentunarháskúlanum í høvuðsstaðnum Kyiv (Kiev). Í 1989 fekk Vasyl heitið heiðurssangari í Ukraina og í 1993 varð hann kosin ukrainskur tjóðsangari. Hetta er hægsta heitið, útinnandi listafólk kunnu fáa í Ukraina. Síðani 1997 hevur Vasyl starvast saman við Filharmoniska orkesturinum í Volyn, har hann eisini undirvísir. Hann hevur havt konsertir í øllum pørtunum av gamla Sovjettsamveldinum og í Eysturevropa, Týsklandi, Svøríki og Danmark.

Mykhaylo Lazuka er føddur í landslutinum Zhytomyr í Ukraina 1957. Miðskeiðis í sjeytiárunum var hann í sovjettiska herinum og luttók í deildini fyri dansi og sangi. Í 1977 fekk hann starv sum sangari í Filharmoniska orkestrinum í Zhytomyr og eitt ár seinni í Filharmoniska orkestrinum í Volyn, har hann enn starvast saman við Vasyl Chepelyuk. Mykhaylo hevur lisið tónleik á lærda háskúlanum í Rivno. Í 1995 fekk hann heiðursløn frá ukrainska forsetanum og árið eftir, í 1996, fekk Mykhaylo sama heiður sum starvsfelagin Vasyl, tá hann varð kosin at vera ein av ukrainsku heiðurssangarunum. Mykhaylo hevur eins og Vasyl havt konsertir í øllum pørtum av gamla Sovjettsamveldinum og í Eysturevropeisku londum, Týsklandi, Svøríki og Danmark.

Skráin hjá operasangarunum báðum byrjar við "O! Sole Mio". Síðani verða vit førd víðari við Vasyl, sum syngur úr La Traviata og Mykhailo, sum syngur "Katarri", ið er neapolitanskur sangur. Tilsamans fimm duettir eru á skránni, eitt nú tiltiknu kosakk-sangirnir, russiskir fólkasangir og heimsins kendasti sálmur "Amazing Grace".

Við á Føroyaferðini er eisini ungi harmonikusnillingurin Vsevolod Lazuka. Hann er sonur Mykhaylo og fer at luttaka ínnímillum í konsertskránni. Vsevolod spælir m.a.Vivaldi, sum hann í staðin fyri strúkarar hevur útsett fyri egna harmoniku.

Tað er føroyska deildin av Skandinavisku Barnamissiónini, sum hevur fingið vitjanina í lag. Føroyskt umboð er Ella Niclasen. Høvuðsskrivstovan hjá missiónini er í Malmö. Arbeiðsøkini hjá Skandinavisku Barnamissiónini eru Filipsoyggjar, har arbeitt verður millum børn í trongum korum, og í Ukraina, har millum annað arbeitt verður fyri geislaskæddu børnini úr Tjernobyløkinum.

Konsertin við ukrainsku operasangarunum verður í Høllini í Norðurlandahúsinum leygardagin 30. november klokkan 16:00. Við steðgi varir konsertin í tveir tímar. Atgongumerki, sum kosta 100,- krónur fáast í Húsinum og Kunningarstovuni í Havn.



*Ukrainsku operasangararnir Vasyl Chepelyuk og Mykhailo Lazuka*




UNIVERSITY OF ABERDEEN

VETRARSKEIÐ

LÆR ENSKT Í SKOTLANDI

Intensivt skeið á University of Aberdeen
1, 2 ella 3 vikur

**SKEIÐ 1:**
**21. Oktober – 13. Desember**
Byrjanarskeið: Tey, sum duga enskt á byrjunarstøði.

**SKEIÐ 2:**
**13. Januar – 21. Mars**
Miðal: Tey, sum hava nakað av kunnleika til enskt frammanundan.

**SKEIÐ 3:**
**7. Apríl – 20. Juni**
Yvir miðal: Tey, sum hava kunnleika í enskum, men vanta royndir til víðari lestur.

**KOSTNAÐUR FYRI HVØNN:**

| 1 vika | 2 vikur | 3 vikur |
|---|---|---|
| **7.949,-** | **12.549,-** | **17.749,-** |

**Íroknað prísin er:**
Flogferð Føroyar – Aberdeen og aftur við ferðaavgjøldum. Undirvísing í minst 20 tímar um vikuna + kjak tímar. Undirvísingartilfar. Innivist á einakamari á skúlaheiminum Kings Hall.

Ferðatrygging er ikki íroknað.

Ivast tú í, hvørjum støði tú ert á, so kanst tú tosa við ein lærara á University of Aberdeen, sum hjálpir við at finna rætta skeiðið.

Um gist verður á hotelli ístaðin fyri á skúlaheiminum, kostar tað 900 krónur eyka um vikuna.

Ring og fá meiri at vita um skeiðini á tel. 34 10 40, Atlantic Airways.

Les meira á heimasíðuni hjá University of Aberdeen www.abdn.ac.uk

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo






*Nýggi trolbáturin, Dýrindal, hjá Páll Klettskarð kom til Haraldssund mikumorgunin*

# Nýggjur trolbátur til Haraldssunds

**Sannur hátíðardámur valdaði á keiini í Haraldssundi mikumorgunin, tá nýggi trolbáturin Dýrindal kom til bygdina**

TROLBÁTUR
*Solby A. Eliasen*

**Haraldssund:** Hóast tað var nógvur vindur, og tað hevði hug at regna, var fitt av fólki savnað á keiini, tá trolbáturin Dýrindal legði at í myrkrinum fyrrapartin mikudagin. Alt bygdarfólki og fleiri avbygdafólk eisini vóru komin at taka ímóti.

Børn veittraðu við fløggum, og Klaksvíkar Hornorkestur spældi nøkur løg. Heini O. Heinesen helt røðu vegna kommununa, har hann ynskti Páll Klettskarð, eigaranum av Dýrindali, til lukku við nýggja bátinum og bjóðaði teimum hjartaliga vælkomnum. Síðani takkaði Páll Klettskarð fyri stórfingnu móttøkuna.

Aftaná hátíðarløtuna á keiini, bjóðaði kommunan ábit í bygdarhúsinum.

Dýrindal er bygdur á eini nýggjari skipasmiðju á Hafnafirði í Íslandi. Hann kostaði umleið seks milliónir krónur. Fyrst verður helst farið ein royndartúr, áðrenn fyrsti rættiligi fiskitúrurin verður. Tað verða væntandi fýra ella fimm mans við bátinum.


TANN SJÁLVSTÝRDI TRILOBITE
ROBOT-DUSTSÚGVARIN!

HEIMSINS FYRSTI



JÓLAPRÍSUR
14950,-

VIT ÚTVEGA FÍGGING!

| ÚTGJALD | 12 MÐR. | 18 MÐR. | 24 MDR. |
|---|---|---|---|
| 4980,- | 1066,- | 735,- | 570,- |

Set hann á gólvið, og hann dustsýgur fyri teg. Hann eygleiðir alt rúmið av sær sjálvum og altíð. Uttan at møðast, kanst tú dustsúgva hvønn einasta dag. TRILOBITE-dustsúgvarin fæst júst nú í Elding.

Electrolux

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697



Bókadagur 2002

Bókadagur við bókacafé verður sunnudagin 1. desember Kl. 15 - 18 í Norðurlandahúsinum



Skrá fyri Bókadagin 2002 í Norðurlandahúsinum

Kl. 15.00: Bókaframsýningin letur upp
Kl. 15.15: Rithøvundafelagið bjóðar vælkomin
Nýggja heimasíðan hjá felagnum verður tikin í nýtslu
Kl. 15.30: "Kuffi". Brynhild Andreasen lesur úr barnabókini, sum var í uppskoti til norðurlendska virðisløn
Kl. 15.45: "Geislasteinar". Sólrun Michelsen lesur og sigur frá um ævintýrabók sína
Kl. 16.00: Úr farnum tíðum. Ingrið Sondum hevur samrøðu við systkini Elina og Axel Mortensen.
Kl. 16.30: Steðgur, har høvi verður at tosa við høvundar og útgevarar
Kl. 17.00: "Rótleys tøgn". Niels Uni Dam lesur nýggjar yrkingar
Kl. 17.20: Er Jóanes Nielsen fluttur á hvíldarheim? Upplestur og samrøða, sum Vár í Ólavstovu hevur við skaldið
Kl. 17.45: "Karr". Steinbjørn B. Jacobsen lesur úr nýggja savninum
Kl. 18.00: Bókadagurin endar

NORÐURLANDAHÚSIÐ
Bókasølan
Tel. 31 95 75 · Fax 31 01 64 · www.bokasolan.fo
RITHØVUNDAFELAGIÐ